# – Vit kundu ikki bjarga øllum

**Hevði bjargingarliðið á Stord ikki borið so skjótt at, kundi vanlukkan kravt uppaftur fleiri mannalív.**

FLOGVANLUKKA

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Åge Aadland, sum starvast hjá bjargingarliðnum á Stord, er ikki í iva um, at tað var arbeiðinum hjá bjargingarliðnum fyri at takka, at flogvanlukkan ikki kravdi uppaftur fleiri mannalív. Hann heldur, at bjargingarliðið gjørdi eitt sera gott arbeiði.

- Uttan teirra stóra arbeiðið kundi talið á deyðum verið størri, sigur Åge Aadland við Bergens Tidende.

Lensmaðurin á Stord, Reidar Færestrand, sigur, at allir menn, sum vóru tøkir, vórðu sendir á vanlukkustaðið alt fyri eitt. Hann sigur við tíðindastovuna ANB, at bjargingararbeiðið gekk ógvuliga skjótt, men at vanlukkan tíverri kortini kravdi fýra mannalív.

- Tað var ógjørligt at bjarga øllum, sigur Reidar Færestand við ANB.

Magni Arge, stjóri, í Atlantsflogi, rósti eisini bjargingarliðnum, tá hann kom til Stord í gjár. Eftir at hava verið á vanlukkustaðnum segði hann seg vera hugtiknan av tí arbeiði, sum bjargingarliðið hevði gjørt.




*Løgregluovastin, Odd Magne Haaversen (v.m.) og Reidar Færestrand á tíðindafundinum á flogvøllinum í gjár*

# Flogvøllurin hevur útbygging fyri neyðini



*Restirnar frá flogfarinum hjá Atlantsflog vitnar um, at tað hevur verið ein kraftigur eldur. 12 persónar komu út úr flogfarinum á lívi, meðan fýra lótu lív*

**Fyri einum hálvum ári síðani settu norsku myndugleikarnir nýggjar treytir fyri, nær stór flogfør kunnu lenda á Stord.**

FLOGVANLUKKA

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Nýggju treytirnar siga, at stór flogfør skulu ikki seta seg á flogvøllinum, um sýnið er minni enn 800 metrar, ella um vøllurin liggur undir kava ella ísi. Hesar reglurnar eru framvegis í gildi, men hesar treytirnar høvdu kortini ongan týdning í gjár, tí tá var sýnið gott, og vøllurin var næstan turrur.

Stord kommuna eigur 79 prosent av felagnum, sum rekur flogvøllin. Hini 21 prosentini eigur Hordaland fylki. Bergens Tidende skrivar, at tørvur er á einum nýggjum eftirlitstorni, tí verandi tornið er ov lágt til stór flogfør. Harumframt er tørvur á nýggjari sløkkiliðsstøð á flogvøllinum.

Eigararnir høvdu søkt myndugleikarnar um 25 milliónir krónur í stuðuli til útbyggingina, men tá stjórnin legði fíggjarlógina fram í næstsíðstu viku, vóru eingir pengar til flogvøllin á Stord.

Sambært Bergens Tidende vil stjórnin heldur ikki lata stuðul til at reka privatar flogvallir sum tann á Stord.

## Funnu svarta kassan

*Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo*

Í gjár funnu serfrøðingarnir frá skaðanevndini sonevnda svarta kassan og ferðskrásetaran í útbrenda flogfarinum. Hesir verða nú sendir til London, har teir verða kannaðir nærri.

Svarti kassin skrásetir alt, ið fer fram í stýrhúsinum, bæði av tekniskum slag og tað sum flogskipararnir tosa um.

Skaðanevndin og serfrøðingar kanna nú bremsuskipanina hjá flogfarinum og royna at staðfesta orsøkina til, at flogfarið eftir øllum at døma ikki fekk bremsað, tá tað lendi, skrivar NRK.